Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:

Skrásetingar-nr. P/F 3543
Navn: P/F Sundalaks
Adressa: 410 Kollafjørður
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 16.04.2003
Viðtøkudato: 16.04.2003
Kapitalur: Kr. 3.000.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 3.000.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Suni Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn og P/F Havsbrún, 530 Fuglafjørður (P/F 58).
Nevnd: Odd Eliasen, Mørkin, 530 Fuglafjørður (formaður), Suni Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn og Justinus Leivsson Justinussen, 480 Skáli.
Stjórn: Suni Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum, nevndarformanninum, ella tveimum nevndarlimum.
Grannskoðari: P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár:
16.01.2003 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at eiga og reka alivinnu og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 12. mai 2003

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3545
Navn: Sp/f Konsmohús
Hjánevn: Sp/f Konsmo (Sp/f Konsmohús) og Sp/f Setið búgv (Sp/f Konsmohús)
Adressa: 410 Kollafjørður
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 22.04.2003
Viðtøkudato: 22.04.2003
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Svein Askildsen, 410 Kollafjørður.
Stjórn: Svein Askildsen, 410 Kollafjørður.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár:
22.04.2003 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er keyp, søla og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 12. mai 2003

Kristin Balle

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um bíarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 13. mai 2003 samtykti broytingar í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, viðv. ásetingum fyri umráðispartarnar A1 í 3. grundumráði, kap. IV, § 5, stk. 1

1. Loyvt er einans at byggja stakhús við í mesta lagi tveimum íbúðum og - eftir serloyvi frá byggivaldinum - tvíhús, raðhús og ketuhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.

   Í samband við búðstaðirnar skal tó bera til at gera rúm til handlar, onnur vinnuendamál og stovnar, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillur dámin á økinum sum sethúsabýlingur.

Verður broytt til

1. Loyvt er einans at byggja stakhús við í mesta lagi tveimum íbúðum og - eftir serloyvi frá byggivaldinum - tvíhús, raðhús og ketuhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.

   Í sambandi við búðstaðarøkið kann byggivaldið geva serloyvi til at byggjast kunnu handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, við náttúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur.

Tilfar, sum lýsir broytingina, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum frá hósdegi 15. mai til og við fríggjadag 6. april 2003, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.30 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot skulu sendast Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 16. august 2003.

SNARSKIVAN

Hús/íbúð ynskist til leigu

Søkt verður eftir møbleraðum húsum/íbúð til læknaavloysara í juni og juli mánaða.

Runavíkar Kommuna
tlf. 417000
600 Saltangará

Koyrikort

Nýtt skeið til persónbil byrjar á Tórshavnar Trafikkskúla, Slættanesgøta 5 mikudagin 21.05. kl. 17.30.

Hammers Koyriskúli
Tlf. 31 88 21 · fartel. 57 39 40

Tríbekkur til sølu

So gott sum nýggjur tríbekkur bíliga til sølu. Longd 6 m.

Áhugað ringið 332402 ella 332700

TILTØK

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Fríggjadagin kl. 10 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli kl. 18 Møti v/ Petur Háberg.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

Katólska Kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Fríggjadag og leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Martin de Leur í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.

Samkoman Rhema
Staravegur 5
Mikukvøldið kl. 20 verður samkomufundur í Rhema.
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli.
Mánakvøldið 19. mai kl. 20 verður felagsbønarmøti í Kelduni í samband við Hvítusunnustevnuna. Bussur koyrir úr Havn. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

Frelsunarherurin, Tórshavn
Hósdagin kl. 20 Heimaforbundið, vitjan av Birgit og Mariu, allar kvinnur eru vælkomnar.
Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18 farvælmøti fyri Major Knut Gamst. Øll eru vælkomin.

Grøðanarmøti
Møti við Inger og Hans Berntsen verður í Kommunuskúlaauluni í Havn hóskvøldið kl. 20 og í skúlahøllini í Trongisvági dýra biðjudag kl. 18 og leygarkvøldið kl. 20.

Ebenezer
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti. Dýri biðidagur kl. 18 Møti. Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, kl. 21 Útimøti. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.ebenezer.fo

Meinigheitshúsið
Dýra biðidag kl. 18 Møti v/ Jónsvein Joensen.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Thomas Thomasen, Teir fýra syngja.

Karisma
Hvítusunnustevnan 2003 verður í døgunum 6.-9. juni í Ítróttarhøllini á Hálsi, har tiltok verða fyri allar aldursbólkar. Nærri verður lýst seinni.

Samkoman Immanuel
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

Filadelfia, Landavegur 22
Í annaðkvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ pastor Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

KFUM og KFUK í Havn
Hósdagin kl. 19.30 í KFUK: Fundur. Vit hugna okkum.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting.
Telefonandaktin 424741.

Ársmøti í Nesvík
Ársmøti hjá Heimamissiónini verður 15.-18. mai í Leguhúsinum í Nesvík.
Hósdagin kl. 19.30 Sangmøti v/luttøku av streingjakóri úr Vágoynni og Petur Hans Hansen og Thomas Dam. Vitniløta kl. 22.15. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Fríggjadagin 16. mai Gudstænasta í Norðskála kirkju kl. 11 v/ altarg. Evnið kl. 14 er »Vit byggja brúgv« v/ Jørmund Foldbo. Møti kl. 19.30 v/ Marius Jacobsen. Gleði úr Klaksvík syngja. Eftirmøti kl. 22. Andakt v/ Andras Miðskarð. Prayze luttekur við sangi. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Leygardagin kl. 10 Evnið »Guds kall – hvast er tað«, upplegg og orðaskifti við Bergur D. Joensen. Frágreiðingar frá arbeiðinum kl. 14. Møti kl. 20 v/ Niels Jacob Nielsen. Taborkórið av Toftum syngur. Kl. 22.30 Cafe við livandi tónleiki. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta á vanligum støðum. Kl. 15 Familjumøti v/ Mariann D. Poulsen. Barnakór í KFUM & K úr Klaksvík syngja. Leikur v/ Jeanett Mouritsen og øðrum. Møti kl. 18 v/ Sverra Kass. Streingjakórið Thabor úr Fuglafirði syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Barnaskrá er fyri børnini hvønn dag, uttan hósdagin.

Keldan
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Jákup Berg.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Maibritt Frederiksberg.
Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

Getsemane
á brekku 19
Mikudagin kl. 20 Bønarmøti. Profetisk bønarstevna við Gordon Grieve úr Kanada verður 15.-18. mai. Neyðugt er at melda seg til seminarini hjá Sannu Hammer á tlf. 517131. Kostnaður fyri øll seminarini er 150 kr.

Hósdagin er seminar kl. 20. Fríggjadagin kl. 10-12 og 15-16.30. Leygardagin kl. 10-12 og 15-17 og Møti kl. 20.
Sunnudagin kl. 17 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti – Uni talar.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

Aglow, Klaksvík
Møti verður á Soli Deo Gloria týskvøldið 20. mai kl. 20. Elisabet Syré úr Cape Town talar. Allar kvinnur eru vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønar- og lovsongsløta, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.

Betel, Vágur
Dýra biðidag kl. 18 Evangel. fundur.
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

Felagið Tórshavn – Útferð
Sunnudagin 18. mai verður útferð til Borðoyarnes. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.00 stundisliga. Gingið verður 6-7 tímar. Havið heit og góð gonguklæði og matpakka við. Tilmelding.

Betania, Porkeri
Skeið í barnaarbeiði verður leygardagin 24.mai.
Tilmelding á tlf. 373854.

Tilhaldið í Sandoynni
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Dagtilhaldið í Vági
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

Dagtilhaldið Fløvin
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

KONFIRMATIÓN

Konfirmatión í Nólsoyar kirkju sunnudagin 18. mai 2003.

Birita Hansen, Nólsoy
Villi Joensen, Nólsoy
Regin Debess Thomsen, J. Paturssonargøta 37, Tórshavn

GULLBRÚDLEYP

31. mai kunnu hjúnini Esther og Jógvan Nónsgjógv, við Gjógv halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin við Gjógv kl. 18.30. Tey, ið ynskja at gleðast saman við gullbrúðarparinum, verða biðin um at siga frá áðrenn 18. mai á tlf. 423135 ella 263235.

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvorjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

FORD FIESTA
árg. 88 til sølu fyri 5.000,-
Tlf. 424091

14" SPORTFELGUR
4 stk. 14" sportsfelgir, til Ford Sierra til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 447501

VW GOLF 1.9 SDI TIL SØLU
árg. 92, hevur nýggjar alu-felgur við dekkum umframt stálfelgur við pikadekkum. Gott Sony cd-anlegg.
Tlf. 229850 ella 444154

NISSAN BLUEBIRD 2.0 SLX
til sølu. Koyrt 168.000 km. Koyrir væl, góð dekk á sportfelgum. Til sølu fyri 5000 kr.
Tlf. 220323

YNSKIST
Gamal vørugvognur/„rugbreyð" ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 509339 eftir kl. 16

ELLISAKFAR TIL SØLU
Ein Volvo 121, árg. 1965, hevur plátur og koyrir væl, bíliga til sølu.
Tlf. 252072

TOYOTA CAMRY
til sølu sum eykalutir, koyrir væl.
Tlf. 269991

FOPRD ESCORT
Árg. 89 til sølu fyri 5.000 kr. Hevur plátur og koyrir væl, krevur tó nakrar ábøtur.
Tlf. 317964 ella 507880

CITROEN ZX DIESEL
st.car árg. nov. 96, nýsýnaður við tryggingarskaða kr. 15.000,- til sølu fyri kr. 65.000,-
Tlf. 422184 eftir kl. 18

NISSAN PATROL
Nissan Patrol til sølu – árg. 96.
Tlf. 227989

YNSKIST
Ford 1.8 diesel motorur við ella uttan turbo ynskist til keyps.
Tlf. 281421

TIL SØLU
Eykalutir til Honda Accord frá 87-89, 2 hurðar aftan, baklúka og motorur bíliga til sølu.
Tlf. 252623

VW POLO TIL SØLU
Vælhildin VW Polo frá '98 til sølu um hóskandi boð fæst. Pikadekk fylgja við. Ring
Tlf. 21 93 03

VW POLO TIL SØLU
Vælhildin VW Polo frá '98 til sølu um hóskandi boð fæst. Pikadekk fylgja við. Ring
Tlf. 21 93 03

SUMMARDEKK TIL SØLU
Michelin Energy – óbrúkt 4 stk. 175/70 R 14T 1900 kr. 4 stk. 175/65 R 14T 2000 kr.
Tlf. 421390 ella 214501

FELGUR TIL SØLU
Lítið brúktar felgur 215/40 "17" . Passa til Honda Accord og Volvo s40 o.a. bílar. 4 Boltar. Nýprísur 13,500 til sølu fyri 7.800,-
Tlf. 506179

FELGUR TIL SØLU
Lítí brúgtar felgur 215/40 "17" . Passa til Honda Acord og Volvo s40 o.a. bílar. 4 Boltar. Nýprísur 13,500, til sølu fyri 7,800,-
Tlf. 506179

OPEL ASTRA 1.4 S
árg. 89, nýsýnaður. Hevur bert haft ein eigara og bara koyrt 73.000 km. Kostnaður 20.000 kr.
Tlf. 257810

EYKALUTIR – HJÁLP
Er tað nakar, ið eigur ein startara til ein Mazda 323 frá 91.
Tlf. 215118

TOYOTA CARINA 2000
árg. 89 til sølu um vit kunnu einast um prísin.
Tlf. 444012 ella 744012

HONDA ACCORD
1.8 LS 39.000 km, árg. 99 til sølu.
Tlf. 443334 eftir kl. 19

SVARTUR VW POLO
Árg. mai 96, 1900 diesel, 65 hestar, koyrt 134.000 km. Summardekk v/sportfelgum og anlegg. Nýsýnaður - ongan kross.
Tlf. 257690

TIL SØLU
Renault 19 frá 11/94 til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 210408 ella 522832

SPORTFELGUR TIL SØLU
Sportfelgur til Toyota til sølu. Nýggj dekk eru á felgunum.
Tlf. 225398

SPORTFELGUR TIL SØLU
Sportfelgur til Toyota til sølu. Nýggj dekk eru á felgunum.
Tlf. 225398

HONDA CIVIC 1.5 LS
Vtec, árg. 8/98 hevur sportfelgur og vel, til sølu.
Tlf. 253446

PEUGEOT 205
árg. 88, nýsýnaður til sølu.
Tlf. 422771 ella 722771

VOLVO 240/45
árg. 86, vinstrahurð framman ynskist til keyps, helst hvít, men annað kann brúkast.
Tlf. 254996 ella 449628

TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst er ein BMW 316 I, árg. 97, við 225 x 17" sportfelgum og sóltaki til sølu. Bilurin er í sera góðum standi og vælhildin. Áhugað kunnu ringja
Tlf. 261244

16" SPORTFELGUR
4 stk. 16" sportfelgur + 2 GSD dekk fyri 5000 kr.
Tlf. 222610

FORD SCORPIO 2.0
árg. 89 við el rútum, sóltaki og fløguspælara, bíliga til sølu.
Áhugað ringið 223954

MOTORUR
til Ford Escort. Frá mai 91. 1600 EFI. Koyrt uml. 110.000 km, kostnaður 1.500,00 kr
Tlf. 510042

TOYOTA CELICA
árg. 86 2.0 GTI, 150 HK til sølu.
Tlf. 227171 eftir kl. 16

SUMMARDEKK TIL SØLU
Stødd: 175/70 R13. Merki Tyfon, kostnaður 250 kr. stk.
Tlf. 448400 ella 214087

SUMMARDEKK
stødd 185/65 R14. Merki: Tyfon eru sum nýggj. Kostn.: 450 kr. stk.
Tlf. 448400 ella 214087

TIL SØLU
Eykalutir til Toyota Landcruiser HJ 60 motorur, gearkassi, hjelmur, forrútur.
Tlf. 447115 ella 225541

TIL SØLU
Toyota Camry GL 1800, árg. 84. til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 447115 ella 225541

EYKALUTIR
Volvo 240 verður seldur sum eykalutir, ring og gev eitt boð.
Tlf. 226806

TIL SØLU
Nissan Bluebird, árg. 89, í góðum standi. Sýnaður í jan. 2003. Prísur 20.000 kr.
Tlf. 256921 ella 441685

TIL SØLU
4 óbrúktar sportfelgur til Hyundai Acunt. Stødd 195/50R 15.
Tlf. 310512

FORD ESCORT 1.6 CC
frá 06/95. Áhugaði kunnu ringja á
Tlf. 212822

TIL SØLU
Ein Citröen Saxo VTS, árg. 1-11-2002, koyrt 8.000 km. til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 224304 ella 449414

TOPPSTYKKI TIL SØLU
Toppstykki til ein WV 1.6 TD, til sølu.Ein turbo fylgjur eisini við.
Tlf. 211543

MAZDA 626 2.0
Árg. 85 til sølu sum eykalutir. Motorurin er ok. Prísur 2.000 kr.
Tlf. 224450

TOYOTA CARINA II TIL SØLU
Árg. 90, nýsýnaður, í sera góðum standi.
Tlf. 444270 ella 744270

Amboð

TIL SØLU
Brúktur vidfestisvognur til sølu.
Tlf. 447501

ROYTIMASKINUR
4 stk. roytimaskinur á sama aksli. 1 stk. einkult og 1 roytigrýta við allari útgerð í góðum standi, vælegnað til allan fugl, bíliga til sølu.
Tlf. 269106

OPEL OMEGA 1.8i
árg. 90, sýnaður í oikt. 2002, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 424469, e. kl. 18

EIGUR
nakar eina Iris sláimaskinu at selja mær.
Tlf. 441226

Arbeiði

ALT BYGGIARBEIÐI
verður gjørt skjótt og væl. Óbindandi tilboð.Húsasmiðurin Spf/ v. Erik MøllerKoma um alt landið.
Tlf. 361977 ella 220387

MÁLARAARBEIÐI VERÐUR GJØRT
Vilt tú hava húsið, bátin ella annað málað? Alt málaraarbeiði verður gjørt fyri ein sámuligan prís.
Tlf. 262057 ella 265044

ALT SNIKKARA-/TIMBURARBEIÐI
verður gjørt, skjótt og væl.S-timbur
Tlf. 441363, 214363, 210363

Barnaansing

ER TAÐ NAKAR
ið vil passa okkara 1-ára gomlu dóttir, ímeðan vit eru til arbeiðis.
Tlf. 211828 ella 319828

25 ÁRA GOMUL KVINNA
ynskir at ansa børnum millum 0-2 ár. Eigi sjálv eina 6 ára gamla dóttir. Møguleiki er eisini fyri ansing um kvøldarnar. Um hettar ljóðar áhugavert, so ring
251319

Barnaútgerð

BABYALARMUR
Ein Philips baby alarmur til sølu fyri hálvan prís.
Tlf. 310144

BILSTÓLUR TIL SØLU
Renault (Bébé Confort) 0-13 kg. til sølu fyri 600,- kr. Nýprísur 950,- sum nýggjur.
Tlf. 310215

SYSTKINASETUR
Systkinasetur til combivogn ynskist til keyps.
341821 ella 312528

SCANDIA KLAPPVOGNUR
kromstell, myrkablátt betrekk, metalkurv undir, eitt lambaskinn, myrkablátt regnslag + myrkablá parasol selist alt samlað fyri 1.500,00 kr.
Tlf. 322850

BABYLIFT
Ein svort babylift til sølu fyri 600 kr. Bert brúkt til eitt barn. Sær gott út.
Tlf. 269329

BRIO KOYRISTÓLUR
í góðum standi til sølu fyri kr. 500,-
Tel: 567890

BABYLIFT
Vælhildin babylift 300 kr. Babygym (bleytt spæliteppi) 200 kr. Puslitaska (óbrúkt) 50 kr. Babybaðikar 50 kr. Seingjarkantur til tremmusong 50 kr.
Tlf. 318675

Bátaútgerð

MERCURI 25 HK
til sølu vegna keyp av størri. Manøvre box + tangi fylgir við kr. 10.000,-
Tlf. 221122

BÁTAMOTORUR 35 HK
Arona til sølu. Tveir sama slag fylgja við sum eykadeilir.
Tlf. 456072

JOLLA TIL SØLU
vegna plásstrot. Er í fínasta standi, so gott sum onki brúkt. Prísur: 14.000 kr.
Tlf. 320543 ella 265205

TIL SØLU
6-9 HK páhangari (helst Mariner ella Mercury) ynskist til keyps fyri sámuliga prís.
Tlf. 228447 ella 441964

TIL SØLU
7 mannafar við fiskiloyvi til sølu. Og eitt Bourg Waerner gear 3:1.
Tlf. 221519

TIL SØLU
40 hestar Perkins bátamotorur til sølu.
Tlf. 319584 ella 213484

EITT
nýsmíðað 5-mannafar til sølu. Ring og hoyr nærri
tlf. 225585 ella 421674, Terje

HONDSNELLUR YNSKJAST
Er nakar, ið vil selja mær tvær hondsnellur bíliga.
Tlf. 443320 ella 223515

TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, er eitt áttamannafar við fiskiloyvi til sølu. Motorurin krevur ábøtur.
Áhugað ringið 455322 ella 215322

SKANTI 3000
Ein Skanti 3000 VHF sum nýggjur til sølu.
Tlf. 318675

TIL SØLU
4 DNG 24v snellur til sølu.
Tlf. 226732

VÆLHILDIN
306 HK Volvo Penta Tamd 61A bátamotorur til sølu.
Tlf. 223765

Bingo

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði leygardagin 17. mai kl. 16.00.
Eldrafelagið Borgin

GOTT BINGO
verður í Gistingarhúsinum í Øravík sunnudagin 25. mai kl. 16.00. Høvuðsvinningur 2 x 500 kr. Hvørt bingo 300 kr. Eykaspæl verður eisini.
Suðuroyar Norðara Dansifelag

KAGGIN
Gott bingo verður fríggjakvøldið kl. 20.00. 15 vinningar á lutaseðli m.a. tvey gávukort á 2.000,- Eisini verður spælt bingola og 20 kr. spæl.
Kaggin

GOTT BINGO
verður í Tórshøll leygardagin 17. mai. 20 kr. spæl og bingola. Øll eru vælkomin.
Tórshøll

BINGO
verður í Pálsstovu leygardagin 17. mai kl. 15.00. Full pláta 500 kr. Á lutaseðli 2 x 1.000 kr. og eitt gávukort frá Smyril Line á 3.000 kr. Bingola. Eykaspæl. Koyring heim.
Kiwanisfelagið Rósan

FRÁ EYDNUNI
Gott vingo verður sunnudagin 18. mai kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Høvusvinningur: gávukort frá Smyril Line á 2.000 kr. Eykaspælið 1.400 kr. Drigið verður millum spelini.
Eydnan

GOTT BINGO
Gott bingo verður í Bygdarhúsinum í Hósvík sunnudagin 18. mai kl. 16.00. Nógvir góðir vinningar. Á lutaseðli t.d. ferð fyri tvey til Noreg við Norrønu, 4 dekk við skifti, teoriskeið, lamb til heystar o.a.
Føroyskt cystisk fibrose felag

GOTT BINGO
Gott bingo verður í Glæmuni í Kvívík týsdagin 2. juni kl. 19. 12 plátur 100 kr. Drigið verður í millum spølini. Høvusvinningur á lutaseðli gávukort á 1.000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Burturm. /funnið

LEÐURJAKKI BURTURMISTUER
Svartur leðurjakki burturmistur í Havnini á páskum. Um tú ert tann hepni, ið hevur funnið hann?, so vinarliga ring. Finningarløn verður givin.
Tlf. 251106 Jóhanna

SILVURRINGUR FUNNIN
Ein silvurringur við eini perlu er funnin á parkeringsplássinum uttanfyri Argja róðrafelag leygardagin 10. mai. Eigarin kann ringja
Tlf. 319858

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki